

Gudstænastur

Nýggjársaftan
Vesturkirkjan: Høgni Poulsen kl. 23.30
Klaksvík: Henning Bøgesvang kl. 23.30

Nýggjársdag
Klaksvík: Elsa Funding
Arnafjørður: Henning Bøgesvang, altargongd
Í øllum kirkjum í Norðoyggjum gongur talvan til frama fyri Bibliufelagið.

Sunnudagin eftir nýggjár
Klaksvík: Henning Bøgesvang

Evangeliihúsið, Tróndargøtu

Bønarmøti nýggjársaftan kl. 23.00 og nýggjársveitsla nýggjársdag kl. 18.00.
Telefonandaktin tlf. 12266.

Brúdleyp

Mikudagin 30. desember giftast í Rituvíkar kirkju Irena Sofia Højgaard, Rituvík og Jóannes Tausen, Argjum.

Brúdleypsadr.: Glyvra Bio.

Framhald av síðu 6

Skuldi so verið, at hetta ikki slepst undan í onkrum føri, sigið tá siggjarunum frá, hvat ið veruligt er ella sokallað »live« og hvat ið er eftirgerð, tant og fjas.

Sjónvarpshyggjarar

MBM

Vøruvognur til sølu

Ein vøruvognur, við kassalast, ið rúmar 13 m³, innrættaður við búðurfestingum og hurðum aftan og á síðuni.

Bilurin er sera væl hildin og í besta standi. Píkadekk fylgja við.

Merki: **Toyota Dyna 3000**
Eginvekt: **2.575 kg, Brutto: 350 kg.**
Aldur: **nov. 1986**
Koyrt: **20.000 km.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bjørn.
Bilurin kann roynast eftir avtalu.

L/F MJÓLKARVIRKI BÚNAÐARMANNA

P.O. BOX 22 - TEL. (009 + 298) - TELEX 81345 - FAX 11543
GIRO 52728 - 110 HOYVÍK FAROE ISLANDS
DEILDIR: MJÓLKARVIRKI 800 TVØROYRI TEL. + 71068:
FØÐURDEILDIN 410 KOLLAFJØRÐUR TEL. + 21478

Regluligu fundir býráðsins í 1988 verða hildnir hesar dagar kl. 19 í Trongisvágs skúla:

27/1 — 24/2 — 23/3 — 18/5 — 8/6 — 14/9 — 12/10 — 16/11 og 14/12.

TVØROYRAR BÝRÁÐ



Til

Til stýrir í mongum førum hvørsfalli, tala vit t.d. um bygdir, lond ella fornøvn.

Vit fara *til Havnar, til Kvívíkar, til Sandavágs.*

Vit fara *til Onglands, til Noregs, til Danmarkar.*

Hann kom *til okkara.* Nú hoyra vit fólk viðhvørt siga: Hann kom til okkum.

Skipini fara *til Grønlands.*

Bátarnir fara *til útróðrar.*

Í málteigum er skrivað um, at ikki ber til at siga ella skriva ja til, nei til.

Óneyðugt er at nevna dømi um, hvussu vit skulu siga heldur enn ja til ella nei til, hugsa fólk seg um, so duga tey á at skyna.

Hvat sigur tú til tað?

Hvussu mangan hava vit ikki hoyrt handa spurningin?

Hvat sigur tú *um* tað?

Mamman til báðar dreingirnar var eisini har, soleiðis varð sagt.

Mamma báðar dreingirnar var eisini har, soleiðis kundi heldur verið sagt.

Hann kundi eisini sagt: *Mamman at báðum dreingjunum* var eisini har. Hann kundi sagt soleiðis.

Í kvæðunum stendur: Tó at hann er ein heiðin hundur, er hann tó *faðir at tær.*

Hevur tú sagt farvæl til skipslívið? Maðurin hevði verið til skips í mong ár.

Fert tú ikki til skips aftur?

Fert tú ikki burtur aftur?

Ert tú nú uppi lagstur?

Eg segði farvæl til hann, soleiðis segði ein maður. Hann skuldi heldur sagt: *Eg segði honum farvæl.*

Onkur fanst at, at fólk siga so ofta bye bye og ikki farvæl. Og so leggur hann ráðini: Nú gera vit av at siga bye bye til bye bye.

Ráðini hann legði, vóru málspilla við lit.

Hann skuldi sagt: Nú gera vit av at siga byebye byebye. Ikki ber til at siga farvæl til og heldur ikki bye bye til.

Vit siga takk til Hanus fyri hjálpina.

Vit takka Hanusi fyri hjálpina.

Tað líkist ongum, at fólk koma ikki til tíðina.

Tað líkist ongum, at *fólk koma ikki stundisliga.*

Bussleiðirnar koyra til og frá Fuglafirði.

Bussleiðirnar koyra til Fuglafjarðar og úr Fuglafirði. *Til stýrir hvørsfalli; úr stýrir hvørjumfalli,* tí ber ikki til at siga til og frá og bara hava bygdarnavnið eftir tí seinra fyrisetingarorðinum úr. Fyrimyndin er danskt mál.

Hann gav eina bók til okkum, segði onkur frá. Hann skuldi sagt: *Hann gav okkum eina bók.*

Vilt tú selja handa jakkan til mín?

Vilt tú selja mær handa jakkan?

Sig tað til hansara. *Sig tað við hann. Sig honum tað.*

Verða veiðiloyvini latin til vinir og kenningar?

Verða veiðiloyvini latin vinum og kenningum?

Tað lønar seg at geva fiskamjøl til góðar mjólkkýr. *Tað lønar seg at geva góðum mjólkkúm fiskamjøl,* so segði bóndin.

Snoddið er systurskip til Niels Paula, stóð skrivað.

Snoddið er systurskip Niels Paula.

Hon er systir hansara. Eingin sigur, *hon er systir til hansara.*

TB tapti 3 - 5 til HB, soleiðis varð skrivað um itrótt.

TB tapti fyri HB 3 - 5, soleiðis siga fólk.

Grundarsteinurin til ta nýggju kirkjuna varð lagdur í dag; soleiðis ber ikki til at siga.

Grundarsteinurin undir ta nýggju kirkjuna varð lagdur í dag, skulu vit siga.

Hetta er *hornasteinurin undir teirri gomlu kirkjuni,* soleiðis segði maðurin.

Teir eru farinr at grava út til grund.

Teir eru farnir *at grava út fyri grund.*

Suðuroyingar høvdu sagt *at grava út fyri grundum.*

Soleiðis sigur hann til allar tíðir. Munnu vit ikki heldur siga: *Soleiðis sigur hann altíð.*

Orsøkin til eldsbrunan er ikki funnin enn, soleiðis fullu orðini.

Eingin veit, hví eldur kom í.

»Hvør var orsøkin til, at bilurin fór út av vegnum?« spurdu teir bilføraran.

»Orsøkin var hálka«, svaraði bilførarin.

Aftur dømi um málsligt hjálparloysi.

T. ir skuldu spurt bilføraran: *»Hví* fór bilurin út av vegnum?«

Bilførarin kundi svarað: *Tí tað var so hált.*

Orsøkin til er útlendskt málbrúk. Á føroyskum eigur tað at vera *hví* og *tí.*

Klokkan er trý korter í fimm.

Maðurin varð spurdur, hvussu nógv ið klokkan var.

Hann skuldi havt svarað: *Klokkan er trý korter til fimm.*

Varð hann spurdur hálvan tíma fyrr, so skuldi hann havt svarað: Klokkan er eitt korter til fimm.

Nú er so vanligt at hoyra fólk siga: Klokkan er ein kvart í fimm. Klokkan er fýra fimm og fjøruti. Klokkan er ein kvart yvir fýra. Klokkan er eitt korter yvir fýra. Klokkan er fýra fimtan.

Slíkt málbrúk er ávirkað av útlendskum málbrúki.

Útlendingum tykir løgið, at føroyingar siga trý korter til fimm og eitt korter til fimm; men soleiðis er málbrúkið hjá okkum, og vit skulu ikki lata tað dvína fyri útlendskari tungu.

Sv.T.

Læknavaktir

Tórshavn: Kaj Kallsberg, tlf. 13150, nýggjársaftan, Andor Ellefsen, tlf. 12233, nýggjársdag, Álvur av Kák, tlf. 12557, leygardagin og Sølvi W. Olsen, tlf. 16611, sunnudagin.

Eysturoyggin: Poul Olsen, tlf. 47010, nýggjársaftan, Pól Johs. í Horni, tlf. 44038, nýggjársdag, Sigvald Kristiansen, tlf. 41517, leygardagin og Pól Johs. í Horni, tlf. 44038, sunnudagin.

Norðoyggjar: Ólavur Gaard, tlf. 56900, nýggjársaftan og Jaspur Petersen, tlf. 56400, hinar dagarnar.

Suðuroy (norður): Tlf. 71560.

Suðuroy (suður): Tlf. 73030.

Vágoy: Tlf. 32413.

Tannlæknavakt Tórshavn

Bráðfeingishjálp kl. 13.00 - 14.00, tlf. 14544.

18. desember fingu Marita og Bjarni Danielsen, Ljósá, eina dóttur.

19. desember fingu Magnina og Høgni Djurhuus, Streymnes, eina dóttur.

23. desember fingu Maria og Jonnar Djurhuus, Morskranes, eina dóttur.

25. desember fingu Malan Egilstrød og Magnus Pauli Poulsen, Eiði, eina dóttur.

25. desember fingu Alice og Marni, Tórshavn, tvíburar, dreingir.



26. desember fingu Steinbjørt Berg, N. Gøta, og Sunnleif Berthelsen, Strendur, eina dóttur.